UTTAN ÚR HEIMI

## Bigley latin øðrum

Kuwaitiska blaðið Al-Rai-Aam vil vera við, at teir, sum burturfluttu bretan Kenneth Bigley í Irak, hava latið einum øðrum felagsskapi hann.

Nú sigur Paul Bigley tað sama. Hann hevur gott samband við fólk í Kuwait, og hann sigur seg hava fingið varhugan av, at bróðurin nú situr gísli hjá einum øðrum felagsskapi.

Sum skilst vil felagsskapurin, sum nú hevur Kenneth Bigley sum gísla, hava pengar aftur fyri at lata hann leysan. Teir upprunaligu burturflytararnir kravdu, at allar kvinnur í irakskum fongslum skuldu latast leysar, men amerikanararnir sýttu fyri at gera eftir hesum kravinum.

Paul Bigley sigur við Reuters, at vilja burturflytararnir hava pengar aftur fyri at lata bróðurin leysan, kann ein loysn finnast. Sjálvur hevði hann vónað at fáa hjálp frá bretsku stjórnini, men ta vónina hevur hann mist, sigur hann.

Ístaðin fyri hevur Paul Bigley havt samband við libysku stjíornina, samstundis sum írska stjórnin hevur verið í sambandi við jordanska kongin, Abdullah, og palestinska leiðaranm, Yasser Arafat, fyri at fáa teir at gera sítt til, at Kenneth Bigley verður latin leysur. At Írland er komið upp í málið kemst av, at Kenneth Bigley er hálvur íri.

## Liva av tí almenna

Tøl hjá donsku hagstovuni vísa, at umleið 880.000 danir liva av pengum frá tí almenna. Tað svarar til fjórða hvønn dana ímillum 18 og 66 ár, og tá er stuðulin til tey lesandi ikki taldur við.

Kortini eru tey, sum liva av almennum stuðuli, færri í tali nú enn fyri tíggju árum síðani, skrivar Politiken. Í 1995 livdu 28 prosent av teimum, sum vóru ímillum 18 og 66 ár, av almennum stuðuli, men tá arbeiðsloysið fór at minka í seinnu helvt av nítiárunum, minkaði stuðulin frá tí almenna eisini.

Danskir búskaparfrøðingar hava kortini fremstafingur á lofti. Teir siga, at sjálvandi er tað gleðiligt, at færri liva av pengum frá tí almenna, men samstundis skal havast í huga, at tað verða færri og færri til at bera byrðarnar, og at talið á eldri fólki fer at veksa nógv í komandi árum.

– Tí er tað umráðandi, at fólk, sum í dag liva av almennum stuðuli, fáa eitt arbeiði ístaðin fyri, sigur búskaparfrøðingurin Thomas V. Pedersen við Politiken.

## Útvarp fekk bót

Ein útvarpsstøð í Uganda hevur fingið bót, tí hon hevði eina samrøðusending við samkyndum monnum.

Ugandiski kunningarmálaráðharrin, Nsaba Buturo, vil vera við, at sendingin eggjaði fólki til at liva sum samkynd. Uganda er eitt guðrøkið land, og tað er ólógligt at liva sum samkyndur her, sigur ráðharrin, og hann kærdi tí útvarpsstøðina fyri útvarpsnevndini. Úrslitið var, at støðin fekk 7.000 krónur í bót.

Bótina hevur útvarpsstøðin goldið, men hon hevur samstundis gjørt vart við, at hon ætlar sær ikki at góðtaka fleiri bøtur av hesum slagnum. Joshua Kyalimba, útvarpsmaður, sum legði sendingina við teimum samkyndu til rættis, sigur, at tey samkyndu hava rætt til at bera síni sjónarmið fram.

# Fjórðahvørt offur er eitt barn

**Umleið ein fjórðingur av teimum, sum hava latið lív í ísraelsku álopunumm á Gaza-geiran seinastu dagarnar, eru børn.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Nógv palestinsk børn eru deyð í teimum ísraelsku álopunum seinastu dagarnar. Hesin drongurin varð særdur í einum álopi mánadagin*

Síðani ísraelski herurin fór undir átakið í Gaza-geiranum í síðstu viku, hava umleið 70 palestinar latið liv. Útlendskir hjálparfelagskapir siga, at nógv tey flestu eru sivilfólk, og nú sigur ST, at umleið ein fjórðingur eru børn.

WHO sigur í einari frágreiðing, at fýra teir fyrstu dagarnar kostaði ísraelska álopið 54 mannalív, og at 13 teirra vóru børn. Hjálparfelagsskapirnir siga eisini, at ísraelski herurin hevur oyðilagt nógv hús, og at í einari flóttafólkalegu oyðiløgdu hermenninir ein barnagarð.

Eygleiðarar halda, at ísraelska átakið hevur til endamáls at leggja trýst á tað palestinska fókið fyri at fáa tað at seta seg upp ímóti teimum víðgongdu felagsskapunum. Onnur halda, at átakið er liður í ætlan forsætisráðharrans at avtofta tær jødisku niðursetubygdirnar í Gaza-geiranum. Tað skal eftir ætlanini gerast næsta ár.

# Vænta gos í USA

**Alt bendir á, at gosfjallið Mount St. Helens nærhendis Seattle fer at goysa fyrsta dagin**

GOS
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Mánadagin hekk eitt stórt skýggj uppi yvir gosfjallinum Mount St. Helens nærhendis amerikanska býnum Seattle, og serfrøðingar siga, at nú er lítil ivi um, at fjallið fer at goysa um stutta tíð.

Serfrøðingarnir siga, at botnurin á gosopinum er hækkaður fleiri metrar ta seinastu tíðina. Teir halda eisini, at hitin er vorðin so nógvur nú, at ísur, sum lá ovast á fjallinum, er tiðnaður, og at vatnið er runnið niður í gosopið. Har er eftir øllum at døma so heitt, at vatnið kókar, og tí hevur eitt skýggj hingið uppi yvir fjallinum teir seinastu dagarnar.

Amerikanski jarðfrøðistovnurin segði í gjár at kanska er tað bara ein spurningur um tímar, til Mount St. Helens fer at goysa. Seinast fjallið goysti var í mai í 1980.

# Pinochet hevur mist minnið

**Ein av læknunum, sum hava kannað fyrrverandi kilska einaræðisharran, vil vera við, at Pinochet minnist einki**

RÆTTARMÁL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyrrverandi einaræðisharrin í Kili, Augusto Pinochet, minnist so illa, at hann er ikki førur fyri at svara fyri seg í einum rættarmáli.

Tað sigur læknin Sergio Ferrer. Saman við tveimum øðrum læknum hevur hann kannað heilsuna hjá tí 88 ára gamla Pinochet, og niðurstøða hansara er, at tann gamli forsetin er viknaður nógv í seinastuni.

Hinir báðir læknarnir hava ikki kunngjørt enn, hvat teir halda um heilsustøðuna hjá Pinochet. Teir hava boðað frá, at teir fara at kunngera síni úrslit fríggjadagin.

Tað var dómarin Juan Guzman, sum bað teir tríggjar læknarnar kanna Pinochet. Dómarin vil hava greiði á, um Pinochet kann koma fyri rættin, so hann kann ákærast fyri brotsverkini, sum einaræði hansara framdi í árunum frá 1973 til 1990.



*Augusto Pinochet hevur mist minnið*

# ítróttur

Nr. 190 • mikudagur • 6. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

**Dystur í dag:**
Upp- og niðurflytingardystur 1/2 deild
Fuglafjørður Kl. 17.00 ÍF-B71 Dómari: Lassin Isaksen

# HB væl á veg í 2. deild

**Unga manningin á 3. deildarliðnum hjá HB gjørdi bart í fyrra upp- og niðurflytingardystinum móti 2. deildarliðnum hjá KÍ um rættin til at spæla í 2. deild komandi ár. HB vann dystin í Klaksvík 4-0**

UPP- OG NIÐURFLYTING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Tað leikaði mangan hart á framman fyri málinum hjá Jákupi Mikkelsen, tá ið KÍ og HB mánadagin leiktu fyrra upp- og niðurflytingardystin um rættin til at spæla í 2. deild komandi kappingarár.*
*mynd: Símun á Høvdanum*

Undan dystinum vóru tað kanska fleiri, ið mettu, at HB ikki fór at gera nakað við liðið hjá klaksvíkingum, tí tað hevur ikki gingið so væl hjá teimum næstbestu hjá HB, ið blakaðu trygga leiðslu í 3. deild fyri borð seinastu umførini í landskappingini.

### Kend andlit

Á báðum liðunum vóru nøkur kend og roynd andlit. Í málinum hjá KÍ stóð eingin annar enn sjálvur landsliðsmálverjin, Jákup Mikkelsen, og harafturat vóru bæði Marek Wierbicki og Harley Bertholdsen við á KÍ-liðnum.

HB-liðið var sum áðurnevnt sera ungt, men nakrir veteranir vóru tó eisini við. Ingi Rasmussen var á sentrala miðvøllinum, og frammi í álopinum var 41 ára gamli Gunnar Mohr, sum enn hevur gamla máltevið.

Tað kom bert tað eina málið í fyrra hálvleiki. Gunnar Mohr streyk avstað í øðrum borðinum, og hann sendi eitt hart innlegg móti álopsfelagnum Herman Mortensen, men ístaðin rakti bólturin ein verjuleikara hjá KÍ í búkin og snýtti Jákup í málinum hjá KÍ.

T að sást á øllum brøgdum, at HB-liðið var sera uppsett til dystin, og serliga á miðvøllinum var havnarliðið við yvirlutan.

### Hittast aftur um tvær vikur

Í seinna hálvleiki gekk bert ein lítil løta, so hevði HB økt um leiðsluna. Herman Mortensen fangaði bóltin frá KÍ-verjuni, og tá ið hann sá, at Jákup Mikkelsen var staddur rættuliga uttarlaga, gúppaði hann bóltin í einum bleytum boga upp um landsliðsmálverjan og í málið til 2-0.

Nakað seinni økti HB til 3-0, tá ið ungi miðvallarin Roy Poulsen við einum frálíkum langskoti sendi í netið, og seinasta orðið í dystinum átti veteranurin Gunnar Mohr. Hann slapp leysur móti málinum hjá KÍ, og nærum av gomlum vana sendi hann framvið Jákupi til 4-0, og harvið hevur havnarfelagið allar møguleikar fyri at vinna sær sess aftur í næstfremstu deildini í føroyskum fótbólti.

Í mun til uppgerðirnar millum ÍF og B71 um rættin til at spæla í 1. deild, sum verður avgjørt í kvøld, verður seinni dysturin millum KÍ og HB ikki leiktur fyrr enn um slakar tvær vikur í Havn.

# Alt er púra opið

**Eftir fyrra upp- og niðurflytingardystin millum B71 og ÍF á Sandi mánadagin, er alt púra opið undan returdystinum í Fuglafirði í kvøld.**

UPP- OG NIÐURFLYTING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Spenningurin er stórur undan dystinum millum ÍF og B71 í Fuglafirði í kvøld. Tá ið liðini bæði spældu fyrra upp- og niðurflytingardystin á Sandi mánadagin, vann B71 1-0, og tí er einki avgjørt enn.

### Dreymamál

Tað var ikki av bestu líkindum til at spæla fótbólt heima á Sandi mánadagin, og vindurin var nógvur. Sandoyingar høvdu vindin ímóti í fyrra hálvleiki, men tað tóktist tó ikki at nerva spælið nakað serligt.

ÍF hevði nakrar royndir á málið hjá B71, men tó ikki nakað, ið av álvara kundi hótta roynda pólverjan, Waldemar Novicki, í málinum hjá B71. Ístaðin var tað heimaliðið, sum um miðjan fyrra hálvleik kundi leggja seg á odda.

Sandoyingar vóru í álopi, og ein bóltur bleiv sendur inn í brotsteigin hjá ÍF. Bartal Eliasen var hægstur og fekk skallað út frá, men beint til brasiliumannin hjá B71, Clayton Soares, sum úr 25 metra fjarstøðu heilflúktaði bóltin í meskarnar, uttan at Karstin í málinum hjá fuglfirðingum hevði nakran sum helst møguleika at bjarga. Eitt sera, sera vakurt mál.

Sandoyingar áttu eisini at fáa ein gyltan møguleika til at økja um leiðsluna, tá ið Eli Hentze slapp framvið málverjanum hjá B71, sum síðani feldi roynda álopsmannin. Eingin ivi var um brotssparkið frætta vit bæði úr Fuglafirði og av Sandoy, men dómarin lat ikki við seg koma.

Fuglfirðingar vóru nær við at javna, og besta møguleikan hevði Høgni Zachariassen, sum púra leysur sendi skallara á stongina og út til málspark. Fyrri hálvleikur var sum heild javnur, men sandoyingarnir høvdu verið neyvari, og tí vóru tað teir, sum vóru á odda, tá ið farið var til hálvleiks.

### ÍF tók yvir

Í seinna hálvleiki vóru gestirnir úr Fuglafirði við yvirlutan. ÍF trýsti óført fyri at javna, men tað gekk ógvuliga striltið at raka málið.

Ein tann størsta møguleikan hjá ÍF hevði Høgni Zachariassen, tá ið ein bóltur bleiv sendur innfyri til hansara, men púra ódekkaður og fyri opnum máli rakti Høgni ikki bóltin, tá ið hann skuldi skalla hann í tóma málið.

Sandoyingar høvdu eisini onkrar skotroyndir á ÍF-málið, men Karstin í málinum hevði fult tamarhald á tí mesta.

Tað komu ikki fleiri mál í dystinum, og tí er tað B71, sum er omaná undan dystinum í Fuglafirði í kvøld.

Tríggir týðandi leikarar hjá ÍF vóru undan dystinum á Sandoy mánadagin í vanda fyri at fáa leikbann, um teir fingu eitt gult kort í fyrra dystinum, men hvørki Bartal Eliasen, Rúni Elttør ella Fritleif í Lambanum fingu nakra ávaring, og tí eru teir allir við í spennandi dystinum í kvøld.

Dysturin í Fuglafirði í kvøld byrjar klokkan 17.00, og dómari verður Lassin Isaksen. Hjálpardómarar verða Jón Kári Fredrikssen og Jens Albert Simonsen.